ArtiCon søkir eftir
# FÍGGJARLEIÐARA

Hevur tú áhuga í bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýring, so er tú kanska persónurin, sum vit leita eftir.

Í sambandi við at fíggjarleiðari okkara hevur valt at taka við øðrum avbjóðingum, søkja vit eftir nýggjum fíggjarleiðara.

Talan er um eitt spennandi starv, sum umfatar allar tættir innan bókhalds- og roknskapararbeiði og fíggjarstýring umframt yvirskipað fyrisitingararbeiði. Avbjóvingarnar eru nógvar, og arbeiðsumhvørvið er jaligt og mennandi.

Høvuðsamboðini eru Navision við Invoice Workflow til bókhald, roknskap og fíggjarstýring, meðan LøttLøn verður nýtt til lønarbókhald.

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu sendast til niclas@articon.fo ella á postadressu okkara, sum er:
P/F ArtiCon, Postboks 3109,
110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan »umsókn«.

Umsóknarfreistin er 31. okt. 2010.

Eru ivamál ella spurningar, er tú vælkomin at ringja til Niclas Joensen á tel. 216169 ella 350702 í vanligari arbeiðstíð.

Sosialurin 341800

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705



# Rakstrarleiðari til MEST Runavík

**Søkt verður eftir rakstrarleiðara til Mest í Runavík**

**Starvið**
Sum rakstrarleiðari fært tú evstu ábyrgd av dagliga rakstrinum á deildini fíggjarliga og rakstrarliga. Rakstrarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran, og er partur av leiðslubólkinum fyri samtakið. Rakstrarleiðarin skal vera við til at menna virkið søluliga og tekniskt, styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi.

Arbeiðsplássið er á Mest Runavík.

**Høvuðsuppgávur**
- at vera dagligt bindilið millum virkið, viðskiftafólk, veitarar og myndugleikar
- at leggja ætlanir fyri arbeiði á virkinum
- at vera formonnum og starvsfólki ein ráðgevi í tekniskum spurningum
- at leiða tilboðsgeving og søluvirksemi og at gera eftirmetingar av arbeiðum - bæði fíggjarliga og tekniskt.

**Førleikar**
Vit rokna við, at tú:
- fyrst og fremst hevur góð leiðaraevni
- hevur góð búskaparlig-, sølu-, samskiftis- og samstarvsevni
- hevur evni at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert førur fyri at taka avgerðir
- dugir væl at málbera teg á føroyskum og skandinaviskum. Kunnleiki til enskt er fyrimunur.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

**MEST P/f**
FO-110 Tórshavn
Att.: Mouritz Mohr, stjóri

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. november 2010.

Nærri upplýsingar fáast hjá Mouritz Mohr, telefon 79 11 30 ella mouritz.mohr@mest.fo

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.



*Á deildini hjá Mest Runavík fer fram søla, framleiðsla og umvæling av framleiðsluútgerð, serliga úr rustfríum stáli, so sum framleiðslubond, el- og pneumatiskar stýringar, kassalyftarar, íleggjarar til saltfiskaframleiðslu, avsaltarar o.tl. Deildin selir harumframt kryvjimaskinur, rækjumaskinur og aðra framleiðsluútgerð. Í løtuni eru 25 fólk í føstum starvi á deildini.*

*Mest Runavík er partur av samtakinum P/F MEST, har tilsamans um 170 fólk starvast við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, el, beding- og dokkvirksemi, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving, verkfrøðinga- og teknistovuvirksemi og beinleiðis sølu. Mest hevur deildir í Tórshavn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

MEST
MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo



SENDISTOVAN

# SKRIVSTOVUHØLI YTST Á ARGJABOÐA

Hølini eru nýumvæld og hava framúrskarandi útsýni yvir fjørðin. Til ber at leiga allan bygningin ella hvørja hædd sær.

Meira fæst at vita við at ringja til **Rasmus Magnussen á telefon 794 270.**

BYGNINGURIN HEVUR:
- 4 hæddir
- Góð parkeringsviðurskifti
- Framúr útsýni
- Allar tøkniligar innleggingar



Altíð tað nýggjasta